# Tónleikur til einhvønn smakk

**Á triðja sinni skipa tey ungu í Heimamissiónini fyri stórfingnari konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*

Leygarkvøldið verður Mentanarhúsið í Fuglafirði aftur karmur um eina konsert. Hesuferð verður tað tann árliga gospelkonsertin, sum HeimaMissións Ungdómur (HMU) skipar fyri.

Bólkarnir í ár vera í sang- og tónleikastíli rættiliga ymiskir. Og tí kann sigast, at øll, ið bert hava eitt sindur av áhuga fyri tónleiki, fáa okkurt burturúr, og sum fellur í teirra smakk.

Umframt nógvan tónleik, verður eisini ein andakt á skránni, videoklipp á stórskýggja og bóka- og kaffisøla.

Teir fýra bólkarnir, ið spæla á konsertini vera: Ungdómskórið í Vágum, Credo, Proclaime, og I Am.

Atgongumerki til konsertina, ið byrjar kl. 22, fáast við dyrnar.



*Konsertirnar hjá HMU eru vanliga væl dámdar millum tey ungu, eins og henda myndin vísir*

# Kend frisør-andlit í nýggjum hølum



*Hósdagin letur nýggja frisørsalongin í Brekkugøtu í Havn upp*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Karin'sa er navnið á nýggjari frisørsalong, sum hósmorgunin letur upp í Havnini**

NÝGGJ SALON
*Jákup Mørk*

**Tórshavn:** Tær hava rokast óført. Karin Sólsker, Elisabeth M. Johannesen og Ingrid Heinesen Hofgaard hava seinastu vikurnar stríðst av øllum alvi, soleiðis at nýggju hølini í Brekkugøtu, har tannlæknastova eisini er, kunnu vera klár, nú mars mánaði er um at verða hálvrunnin.

Tað er 36 ára gamla Karin Sólsker, sum stendur fyri nýggju salongini, men hóast talan er um nýggja klippistovu, so hevur Karin sjálv nøkur ár á baki í fakinum.

– Eg byrjaði í læru hjá Tótu á heysti 1986, so tað eru um at verða 20 ár síðani. Og so havi eg mest sum verið í fakinum síðani. Fyri knøppum trimum árum síðani royndi eg meg tó sum pedagog, men eg sá tó skjótt, at tað ikki akkurát var tað, sum eg tímdi best, heldur hon.

– Hinvegin haldi eg eisini, at eg lærdi nakað av hesum árinum. Ikki minst tað, at tað veruliga var hárfríðkunaryrkið, sum eg brendi fyri, um eg kann siga tað so.

**Gamal dreymur**

Og hóast hon fyri tað nógva hevur starvast hjá Tótu, so dylir Karin ikki fyri, at hon eisini hevur havt eitt ynski um at arbeiða fyri seg sjálva.

– Tað royndi eg sum so beint eftir at eg var útlærd. Men tað var í eini lítlari salon í Sørvági, har eg var einsamøll, og tað treivst eg ikki so væl við. Mær dámar betri, tá tað er gongd í gerandisdegnum, og ikki minst hevur samveran við starvsfelagar eisini nógv at týða. So skuldi tað verða, so vildi eg hava eina ordiliga salon.

**Vilja fylgja við**

Og tað ynskið hevur hon nú eisini fingið uppfylt. Longu frá fyrsta degi verða tær báðar, Ingrid og Elisabeth aftrurat Karin á salonini, umframt Ann Leivsgarð Henriksen, sum alt fyri eitt byrjar sum lærlingur. Og nýklækti stjórin hevur eisini góðar vónir um, at tær fara at hava nokk at gera.

– Eg haldi í øllum førum, at vit liggja væl fyri. Tá parkeringsøkið við J. Paturssonargøtu verður liðugt, er talan bert um ein heilt stuttan gongutúr til salonina, so tey viðurskiftini eru í øllum førum í lagi. Og so leggja vit okkum eisini eftir at fylgja við mótanum. Sjálv eri eg von við, at skeið í eitt nú London og Keypmannahavn eru ein støðugur partur av fakinum, soleiðis at vitanin alla tíðina verður útbygd og hildin viðlíka, og tað er so avgjørt nakað, sum vit allar ætla okkum at halda fram við, staðfestir hon.

Og tað er einki at fara skeivur í, at umstøðurnar innanveggja eru í topp. Hølini eru fullkomuliga gjørd av nýggjum, og nógv er lagt fyri, til tess at bæði kundar og starvsfólk skulu kenna seg væl.

Mikudagin verða dyrnar so lætnar upp, tá móttøka er á skránni frá 15 til 17, og hósmorgunin verður so fyrsti arbeiðsdagurin hjá Karin í nýggju hølunum. Hølunum, har dreymur hennara nú skal standa sína roynd.

# H. C. Andersen teknikapping fyri børn

Mánadagin byrjaði stóra kappingin fyri børn um at tekna bestu tekningini við myndevni úr onkrum H.C. Andersen ævintýri. Bestu uppskotini verða prentað sum bókamerki og vinna eina bókavirðisløn á 500 kr.

Í sambandi við at H. C. Andersen fyllir 200 ár, verður teknikapping á barnabókasavninum í Havn fyri børn upp til 13 ár. Myndevnið skal vera úr onkrum H. C. Andersen-ævintýri.

Teknitilfar og pappír liggja frammi á barnabókasavninum frá mánadegnum 14. mars til og við leygardagin 2. apríl, sum er føðingardagur H. C. Andersens. Tað ber til hjá børnunum at sita inni á bókasavninum og tekna, ella tey kunnu taka pappír heim við at tekna á.

Tekningin skal hava eina ávísa støddd (21 x 7,5 cm), tí er tað best at fáa pappír frá okkum við rætta mátinum teknaðum á.

Seinasta freist at lata tekningar inn er á sjálvum 200 ára føðingardegnum hjá H. C. Andersen, 2. apríl 2005.

Hósdagin 7. apríl verða vinnararnir kunngjørdir, og allar tekningarnar verða sýndar fram á barnabókasavninum.

Bestu uppskotini verða prentað sum bókamerkir, og teknararnir vinna eina bókavirðisløn á 500 kr.

**-ave-**

# Fundur um tunglyndi

Mikukvøldið 16. mars kl 20 skipar Sinnisbati fyri kunnandi fundi um tunglyndi í Vestmanna Skúla.

Á fundinum fer Regin Jóanesarsson at greiða frá, hvussu tað er at liva við tunglyndi. Birita Clementsen og Oddbjørg Johansen, sjúkarøktarfrøðingar, greiða frá sjúkuni og viðgerðarmøguleikum. Høvi verður eisini at seta spurningar.

Fundurin er ein liður í upplýsandi arbeiðinum hjá Sinnisbata, sum miðar eftir at bróta niður fordómar um tunglyndi. Hetta er av alstórum týdningi fyri, at tað á tann hátt kann gerast léttari at tosa opið um sjúkuna, sum aftur er við til, at fólk koma skjótari í viðgerð.

At vera avvarðandi kann ofta kennast tungt, tí ein vil gjarna hjálpa. Her er tað eisini av stórum týdningi hjá avvarðandi at ogna sær vitan um sjúkuna og práta við onnur avvarðandi.

Tunglyndi kann raka okkum øll. Men tann, sum hevur sjúkuna, er ofta av tí fatan, at viðkomandi sjálv/-sjálvur hevur skyldina av støðuni og søkir tí ikki lækna, fyrr enn støðan er vorðin sera vánalig. Sinnisbati vónar, at upplýsandi arbeiði kann vera við til at forða fyri, at støðan hjá tí tunglynta gerst óneyðuga trupul.

Fundurin er ókeypis, og kaffi og køkur fáast.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**- ave -**